# Fiskastovnar, æti og fiskidagar

## Samrøðukanning millum føroyskar fiskimenn og -kvinnur

**Fiskidaganevndin**

Juni 2011

**Innihald**


Samandráttur .... 4

1. Inngangur .... 5

2. Háttalag .... 6

2.1. Umboðan .... 6

2.2. Evnið í samrøðunum .... 7

3. Reiðskapur og høvuðsfiskasløg .... 9

4. Støðan hjá toskastovninum .... 11

4.1. Støðan hjá toskinum hampiliga góð .... 11

4.2. Toskurin smáfallandi .... 12

4.3. Toskurin er væl fyri .... 13

4.4. Tilgongdin hevur verið góð .... 14

4.5. Støðan hjá toskinum góð í mun til undanfarin ár .... 14

4.6. Samanumtikið: Støðan hjá toskinum góð .... 15

5. Støðan hjá hýsustovninum .... 16

5.1. Støðan hjá hýsuni ring .... 16

5.2. Fáa mest stóra hýsu .... 17

5.3. Hýsan er feit .... 17

5.4. Tilgongdin hevur verið ring .... 18

5.5. Støðan hjá hýsuni frægari .... 19

5.6. Samanumtikið: Støðan hjá hýsuni ring .... 20

6. Støðan hjá upsastovninum .... 21

6.1. Støðan hjá upsanum hampiliga góð .... 21

6.2. Góð blanding av støddini av upsa .... 21

6.3. Upsin er feitur .... 22

6.4. Tilgongdin seinastu árini .... 23

6.5. Støðan hjá upsanum .... 24

6.6. Samanumtikið: Støðan hjá upsanum á leið tann sama .... 25

7. Onnur fiskasløg .... 26

7.1. Longa og brosma .... 26

7.1.1. Longa .... 26

7.1.2. Brosma .... 26

7.1.3. Ongi norsk línuskip ....26
7.2. Reyðsprøka og tunga (flatfiskur) og havtaska....27
7.3. Svartkalvi og kongafiskur....27
8. Æti ....28
9. Fiskidagar....30
10. Friðingar út til 1,5 ella 3 fjórðingar ....33

**Myndir**

Mynd 1. Svar og skipabólkar .... 7
Mynd 2. Svar og reiðskapur.... 9
Mynd 3. Luttøka í kanningini og høvuðsfiskasløg.... 9
Mynd 4. Hvussu er støðan hjá toskinum – er nógv til?....11
Mynd 5. Er fiskurin stórur ella? ....12
Mynd 6. Er fiskurin feitur? ....13
Mynd 7. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?....14
Mynd 8. Hvussu er støðan hjá toskinum í ár í mun til undanfarin ár?....15
Mynd 9. Hvussu er støðan hjá hýsuni – er nógv til? ....16
Mynd 10. Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?....17
Mynd 11. Er fiskurin feitur?....18
Mynd 12. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?....18
Mynd 13. Hvussu er støðan hjá hýsuni í ár í mun til undanfarin ár?....19
Mynd 14. Hvussu er støðan hjá upsanum – er nógv til?....21
Mynd 15. Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?....22
Mynd 16. Er fiskurin feitur?....23
Mynd 17. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?....23
Mynd 18. Hvussu er støðan hjá upsanum í ár í mun til undanfarin ár?....24
Mynd 19. Hvussu er støðan við æti – er nógv lív í sjónum ella? ....28
Mynd 20. Hvussu er støðan við æti í ár í mun til undanfarin ár? ....28
Mynd 21. Hevur tykkara bátur/skip nokk av fiskidøgum? ....30
Mynd 22. Hevur tykkara bólkur nokk av fiskidøgum? ....31
Mynd 23. Hvussu heldur tú sum heild at talið av fiskidøgum hjá flotanum er?....31

# Samandráttur

Sum partur av arbeiðinum við tilmæli til landsstýrismannin í Fiskivinnumálum um støðuna í botnfiskastovnunum og tilmæli um fiskidagar, og hvussu fiskiskapurin skal skipast tað komandi fiskiárið, gjørdi Fiskidaganevndin í mai/juni 2011 samrøðukanning millum føroyskar fiskimenn og –kvinnur. Hetta er fyrsta kanning av sínum slagi í Føroyum.

Tilsamans vóru 59 samrøður gjørdar við føroyskar fiskimenn- og kvinnur og einstakar reiðarar. Samrøður vórðu gjørdar við umboð fyri meiri enn helvtini av flotanum í bólki 1, til og við bólk 4, og ein lítlan fjórðing av útróðrarbátunum í bólki 5A.

Í samrøðuspurnablaðnum varð spurt um, hvørji høvuðsfiskasløgini hjá skipinum vóru, og síðani spurt um støðuna hjá hesum fiskasløgunum. Meiri nágreiniligt varð spurt um hvussu støðan hjá stovninum er, hvussu støddin á fiskinum er, um fiskurin feitur, hvussu tilgongdin hevur verið seinastu árini, og hvussu støðan er í mun til undanfarin ár. Umframt støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum, varð eisini spurt um støðuna viðv. æti. Eisini varð spurt um fiskidagatal, umframt at møguleiki varð at koma inn á onnur viðurskifti.

Út frá kanningini kann samanumtikið sigast, at støðan hjá toskinum er góð. Nógv er til av toski. Toskurin er smáfallandi á at kalla øllum leiðum, tó góður fiskur er uppií. Fiskimenn- og kvinnur siga frá miðalfeitum ella feitum toski, tó ábendingar eru um, at ein ávísur munur er á ymiskum leiðum. Staðfest verður eisini í kanningini, at støðan hjá toskinum er góð ella hampiliga góð í mun til undanfarin ár.

Støðan hjá hýsuni er framvegis ring, og hetta er eisini ein av niðurstøðuni í kanningini. Lítið er til av hýsu. Hýsan er tó stór og feit. Tilgongdin hevur verið ring og er framvegis ring, tó víst verður á glottar. Í samrøðunum verður eisini víst á, at hóast støðan hjá hýsuni framvegis er ring, so er støðan betri í ár enn undanfarin ár, serliga tí at meiri av smáari hýsu er at fáa.

Støðan hjá upsanum er á leið tann sama, sum hon hevur verið seinastu árini. Tað er framvegis hampiliga nógv til av upsa, støddin er blandað, og fiskurin er feitur. Tilgongdin verður mett at verða hampilig, hóast ymiskar meiningar eru um, hvussu tilgongdin hevur verið. Fleiri enn tveir triðingar meta, at støðan hjá upsanum er hampilig, meðan góð 30% siga støðuna verða ringa.

Samanumtikið bendir á, at støðan viðvíkjandi ætinum er rættiliga ymisk, við lítið av æti innari á landgrunninum, meðan støðan tykist verða betri úti á.

Tá umræður fiskidagatalið, so er trupult at gera nakra heildarniðurstøðu. Í partinum um talið av fiskidøgum, verður víst á ymisku hugsanirnar í samband við talið av fiskidøgum.

Í samrøðukanningini brúktu nógvir útróðrarmenn høvið at gera viðmerkingar í samband við ætlaðu friðingina innanfyri 1,5 ella 3 fjórðingar. Tað er breið semja millum útróðrarmenn og –kvinnur, at ein friðing av hesum slagi er ikki rætta loysnin, tí á nógvum leiðum innanfyri bæði 3 og 1,5 fjórðing eru góð fiskimið, har tað bara fæst stórur fiskur. Harumframt verður eisini víst á ta sannroynd, at ungfiskurin ikki altíð er nær landi, men í ár hevur verið at fáa á øllum leiðum.

# 1. Inngangur

Í Føroyum eru 1.600-1.700 menn og kvinnur skrásett at hava fiskiskap sum sína høvuðsinntøku. Stórur partur av hesum fiskimonnum og –kvinnum fiska við skipum, sum fiska botnfisk undir Føroyum. Hesi fólk hava sína dagligu gongd umborð á lemma- og partrolarum, línuskipum og – bátum, trolbátum og útróðrarbátum, og hava sostatt møguleika at nema sær góða vitan, m.a. um hvussu støðan hjá fiskastovnunum er, og hvussu støðan er viðvíkjandi æti í sjónum.

Higartil hava vit í Føroyum í ávísan mun frávalt at brúka hesa vitanina. Endamálið við hesari kanning er, at savna vitan hjá føroysku fiskimonnunum og –kvinnunum, um hvussu støðan hjá høvuðsfiskasløgunum er, og hvussu støðan er viðvíkjandi æti.

Hetta er fyrsta kanning av sínum slag í Føroyum.

# 2. Háttalag

Sum partur av fyrireikingunum til tilmæli til landsstýrismannin í Fiskivinnumálum um støðuna í botnfiskastovnunum og tilmæli um fiskidagar, og hvussu fiskiskapurin skal skipast tað komandi fiskiárið, gjørdi Fiskidaganevndin í mai/juni 2011 samrøðukanning millum føroyskar fiskimenn og –kvinnur.

Kanningin varð skipað sum ein samrøðu- og spurnablaðskanning, har tað frá hálvum mai til hálvan juni vórðu gjørdar 59 samrøður við føroyskar fiskimenn- og kvinnur og einstakar reiðarar. Samrøðurnar vóru í flestu førum gjørdar við fólk umborð á skipunum, og í einstøkum førum við reiðaran (4 út av 59 samrøðum vóru við reiðarar). Í teimum førum, har tað ikki bar til at gera persónliga samrøðu umvegis telefon ella andlit til andlit, varð spurnablað sent við telduposti, sum síðani varð svarað og sent okkum aftur. Kanningin umboðar tilsamans 70 skip og bátar, 52 teirra í bólkunum 1 til 4[1].

Persónarnir, sum samrøður vórðu gjørdar við, vóru tilvildarliga útvaldir, skilt soleiðis at roynt hevur verið at fingið fatur í umboðum fyri øll skipini í bólkunum frá bólki 1 til og við bólk 4T, umframt at vit settu okkum fyri at gera millum 15 og 20 samrøður við útróðrarmenn og –kvinnur í bólki 5A.

Samrøðurnar vóru skrivaðar inn í spurnablað, soleiðis at svarini kundu lesast inn í hagtalsforrit. Harumframt vórðu tær nógvu hundraðtals viðmerkingarnar í samrøðunum skrivaðar inn, og eru ein týðandi partur í greiningini av kanningini.

## 2.1. Umboðan

Tann 1. juni 2011 vóru tað sambært Fiskiveiðueftirlitinum útskrivaði tilsamans 99 fiskiloyvir til skip í bólki 1, 2, 3, 4A, 4B og 4T, og 74 loyvir til bólk 5A (og 632 til bólk 5B), men í veruleikanum eru bert eini 85 av hesum skipum í drift. Sum nevnt vórðu samrøður gjørdar við umboð fyri 52 skip í bólkunum frá bólki 1 til bólk 4T, og umboð fyri 18 útróðrarbátar. Samrøður vórðu sostatt gjørdar við umboð fyri meiri enn helvtini av flotanum í bólki 1 til og við bólki 4, og einum lítlum fjórðingi av útróðrarbátunum í bólki 5A.

Býtt á skipabólkar eru samrøðurnar nøkulunda javnt býttar, tó soleiðis at bólkur 4A og bólkur 5A eru umboðaðir við lutfalsliga fæst samrøðum (í mun til tal av loyvum í bólkinum), meðan bólkur 3 er umboðaður við lutfalsliga flestum samrøðum. Sí eisini mynd 1 niðanfyri.

[1] Í summum førum umboðaði samrøðan/persónurin fleiri skip, hetta var t.d. galdandi fyri einstakar skiparar, sum sigla við ymiskum skipum, og fyri einstakar reiðarar, sum reiða út fleiri skip. Av somu orsøk eru svar komin inn umboðandi 70 skip, meðan talið av samrøðum er 59.




*Mynd 1. Svar og skipabólkar*

Samrøðan ella spurnablaðið er í flestu førum útfylt í samrøðu við, og í summum førum útfylt av skiparanum á bátinum/skipinum. Hetta er galdandi fyri 81% av svarunum. Smá 13% av svarunum eru frá stýrimanni ella manning, meðan 7% eru svar frá reiðarum.

Tá umræður umboðan og spurningin um haldbari í kanningini, verður mett, at svar frá umboðum fyri helvtini av skipunum í bólki 1 til bólk 4, og einum fjórðingi av útróðrarbátunum í bólki 5A, er eitt gott grundarlag til at kunna siga nakað um, hvussu føroyski fiskimaðurin og –kvinnan metir støðuna verða hjá fiskastovnunum og viðv. æti á føroyska landgrunninum.

## 2.2. Evnið í samrøðunum

Evnini í samrøðunum fevndu sum nevnt um støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum og um æti, harumframt varð eisini spurt um fiskidagatalið. Áðrenn farið varð undir samrøðurnar, varð gjørt eitt samrøðu-spurnablað (interview-guide), sum síðani varð brúkt sum grundarlag, tá samrøðurnar vórðu gjørdar.

Í samrøðu-spurnablaðnum varð spurt um hvørji høvuðsfiskasløgini hjá skipinum vóru, og síðani spurt um støðuna hjá hesum fiskasløgunum. Meiri nágreiniligt varð spurt um:

- Hvussu er støðan hjá (*t.d.*) toskinum – er nógv til?
- Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?
- Er fiskurin feitur? (hvussu stór er livurin)?
- Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?
- Hvussu er støðan hjá (*t.d.*) toskinum í ár í mun til undanfarin ár?
- Eru onnur viðurskifti av týdningi, sum kunnu vísast á í smb. við (*t.d.*) toskin?

Umframt støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum, varð eisini spurt um støðuna viðv. æti, har spurt varð um:

- Hvussu er støðan við æti – er nógv lív í sjónum ella?
- Hvussu er støðan viðv. æti í ár í mun til undanfarin ár?
- Eru onnur viðurskifti av týdningi?

Í samrøðuni varð eisini spurt um fiskidagatal, har spurt varð um:

- Hevur tykkara bátur/skip nokk av fiskidøgum
- Hevur tykkara bólkur nokk av fiskidøgum
- Hvussu heldur tú sum heild talið av fiskidøgum hjá flotanum er

At enda varð spurt, um nakað var at leggja afturat – um onnur viðurskifti vóru, sum vóru áhugaverd at fáa við í samband við kanningina.

## 3. Reiðskapur og høvuðsfiskasløg

Í hesum partinum verður hugt nærri at luttøkuni í kanningini, sæð í mun til hvørjum reiðskapi skip og bátar royna við, og hvørji og høvuðsfiskasløgini eru.

Tá hugt verður at, hvussu býtið av reiðskapi er í mun til luttøkuna í kanningini, so telur húkaflotin út ¾ av luttøkuni, meðan ein stórur ¼ er samrøður við fólk umborð á trolarum. Hetta svarar eisini nøkulunda til veruliga býtið í flotanum, har ein munandi partur av loyvunum eru loyvi til línuskip, og línu- og útróðrarbátar.




*Mynd 2. Svar og reiðskapur*

Tá hugsað verður um, at út við ¾ av samrøðunum eru gjørdar við skip og bátar í húkaflotanum, so kemur tað heldur ikki óvart á, at toskur og hýsa eru millum høvuðsfiskasløgini – eins og víst í myndini niðanfyri.




*Mynd 3. Luttøka í kanningini og høvuðsfiskasløg.*

Sum víst í mynd 3 omanfyri, so roynir ein munandi partur av føroyska flotanum eftir toski, antin í beinleiðis veiðu ella sum óbeinleiðis veiðu, t.v.s. sum hjáveiðu tá roynt verður eftir t.d. hýsu ella upsa. Í 48 av teimum

tilsamans 59 samrøðunum varð víst á, at toskur var eitt av høvuðsfiskasløgunum, ið roynt verður eftir. Í 43 av samrøðunum, varð víst á, at hýsa er millum høvuðsfiskasløgini.

Onnur fiskasløg sum vóru væl umboðaði í kanningini eru upsi, sum bæði verður veiddur við troli og húki, brosma og longa, sum einamest verður veidd við húki, hvítingur, sum serliga verður veiddur við húki, og flatfiskur sum verður veiddur við troli. Fleiri onnur fiskasløg vórðu umboðaði í kanningini, og eru tey savnaði í bólkinum onnur fiskasløg.

## 4. Støðan hjá toskastovninum

Toskur er helst týdningarmesta fiskaslagi, ið fiskað verður undir Føroyum. Eru nøgdirnar av toski góðar, so ávirkar hetta eisini raksturin hjá botnfiskaflotanum rætta vegin, meðan vánalig toskaár eisini síggjast aftur á botnlinjuni hjá botnfiskaflotanum. Av somu orsøk er tað eisini stórur áhugi í hvussu støðan hjá toskinum er, og hvat vit kunnu vænta komandi árini. Hesi og onnur viðurskifti hava fiskimenn og –kvinnur sagt sína hugsan um í samrøðukanningini.

### 4.1. Støðan hjá toskinum hampiliga góð

Seinastu árini hevur nógv bent á, at toskastovnurin var við at koma fyri seg aftur. Ein stórur meiriluti av teimum, sum hava luttikið í kanningini (83%), siga eisini at støðan hjá toskinum er góð ella hampilig – vísandi til, at tað er nógv ella hampiliga nógv til av toski. Meðan bert fá (11%) siga at støðan hjá toskinum er ring.




*Mynd 4. Hvussu er støðan hjá toskinum – er nógv til?*

Í samrøðunum varð eisini víst á, at støðan hjá toskinum er betri nú enn hon hevur verið seinastu árini. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri[2].

Útróðrarmaður: *Støðan hjá toskinum ikki verið so góð sum nú í nógv Harrans ár.*

Trolmaður: *Um støðan hjá toskinum var ring, so er hon hampilig nú.*

Útróðrarmaður: *Støðan er hampiliga góð í mun til fleiri ár frammanundan.*

Trolmaður: *Ikki nógvur stórur toskur, men nógvur smáur toskur, tí er tað millum hampiligt og gott.*

[2] Í viðmerkingunum verður skilt millum útróðrarmenn, sum fevna um bólk 5A og 4A og 4B, línumenn, sum er bólkur 3, og trolmenn, sum er bólkur 1, bólkur 2, og bólkur 4T.

Í nøkrum samrøðum varð tó eisini víst á, at støðan kanska ikki var so góð hóast alt.

Línumaður: *Støðan hjá toskinum hevur verið millum ring og hampilig í fleiri ár.*

Línumaður: *Støðan er niðanfyri miðal, royna uttarlaga, fáa nógv smátt.*

Trolmaður: *Støðan hjá toskinum er ikki góð.*

Línumaður: *Tað er sera lítið til av toski.*

## 4.2. Toskurin smáfallandi

Í vár hevur stórt fokus verið á, at nógvur smáur toskur verður landaður, at toskurin hevur verið smáfallandi. Í kanningini verður eisini víst á, at lítið er til av stórum toski, meðan nógv er til av miðalstórum og smáum toski.




*Mynd 5. Er fiskurin stórur ella?*

Í samrøðunum varð eisini aftur og aftur víst á, at uppíblandi av smáum toski sum heild er væl størri enn undanfarin ár. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

Útróðrarmaður: *Toskurin yvirhøvur smáur, lítið av stórum fiski. Smáfiskurin er úti ígjøgnum.*

Línumaður: *Óvanliga nógv smátt uppií, men góður fiskur er eisini uppií.*

Trolmaður: *Blandað allar støddir, men mest 3´ari og 4´ari.*

Útróðrarmaður: *Nakað av stórum, nógv smátt uppií.*

Línumaður: *Nógvur smáfiskur, men eisini góður toskur uppí.*

Heildarmyndin er, at tað er nógv uppíbland av smáum toski á øllum leiðum, men víst verður tó eisini á, at tað á ávísum leiðum fæst toskur av góðari støðd.

## 4.3. Toskurin er væl fyri

Viðvíkjandi spurninginum um toskurin er feitur, tykist breið semja verða um, at toskurin er feitur (46%) ella miðal feitur (48%) – ella samanumtikið at toskurin er væl fyri. Fá (4%) siga at toskurin ikki er feitur.




*Mynd 6. Er fiskurin feitur?*

Tá hugt verður at viðmerkingunum í samrøðunum, eru tað eisini nógv sum vísa á, at fiskurin er væl fyri og hevur góða livur, sum er eitt gott tekin um, hvussu feitur fiskurin er.

**Munur á toskinum á innaru og ytru leiðunum**

Í samrøðunum vóru tað tó eisini fleiri útróðrarmenn og -kvinnur, sum vístu á, at fiskurin ikki var feitur, hevði "onga" livur. Ein útróðramaður sum vísti á, at fiskurin hevði lítla livur segði eisini: *er livurin ov lítil, fær fiskurin ikki nóg nógva føði.* Aðrir útróðrarmenn vístu á, at einki æti var at síggja í toskinum, magin var fyltur við krabbadjórum og skeljadjórum, sum ikki verður mett verða eitt gott tekin. Ein útróðrarmaður segði: *Fiskurin er smáfallandi, og tað er heilt týðiligt, at ætan manglar.*

Tá hugt verður nærri eftir metinginum, av hvussu støðan við ætinum er (meiri um hetta seinni), og hetta verður knýtt at spurninginum um toskurin er feitur ella ikki, so tykist eitt mynstur verða í samrøðunum. Fleiri útróðrarmenn, sum royna nærri undir landi, vísa á, at toskurin ikki er so væl fyri, og at støðan við æti er ring, meðan teir, sum royna longri útiá hinvegin siga støðuna við æti verða góða og toskin verða feitan. Út frá viðmerkingunum í samrøðunum bendir nógv á, at fitin á fiskinum er tengdur at, hvar fiskurin er fiskaður.

## 4.4. Tilgongdin hevur verið góð

Stóra nøgdin av smáum toski bendir á, at tilgongdin hevur verið góð seinastu árini. Fiskimenn og –kvinnur eru eisini samd um, at tilgongdin hevur verið góð (33%) og hampiliga góð (44%) seinastu árini. Bert fá vísa á, at tilgongdin hevur verið ring (9%).




*Mynd 7. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?*

Í nógvu viðmerkingunum um hvussu tilgongdin hevur verið seinastu árini, er mynstrið rættiliga greitt: Tað er breið semja um, at tilgongdin seinastu tvey árini hevur verið góð. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

> Útróðrarmaður: *Tilgongdin frægari enn fyri 3 árum síðani. Síðani 2009 hevur gingið framá.*
>
> Útróðrarmaður: *Nú í tvey fylgjandi ár hevur tilgongdin verið góð.*
>
> Trolmaður: *Mongdin av toski er vaksin munandi í tali, nú fær man fleiri kassar um dagin, og tað er allastaðni.*
>
> Útróðrarmaður: *Góð tilgongd tvey tey seinastu árini, men áðrenn tað var vánaligt.*
>
> Útróðrarmaður: *Seinastu 2 árini hevur tilgongdin verið góð, sjáldsama góð.*

Onnur eru meiri ivasom. Onkur vísir á, at *tilgongdin á uttaru leið ikki hevur verið nakað serlig*. Ein annar vísir á, at *teir siga, at tað er tilgongd, men toskin síggja vit ikki*.

## 4.5. Støðan hjá toskinum góð í mun til undanfarin ár

Eins og við tilgongdini, so er tað eisini ein greiður meiriluti av fiskimonnunum og –kvinnunum, sum metir at støðan hjá toskinum er betur í ár enn undanfarin ár. Meiri enn ein triðingur (37%) siga, at støðan er góð í mun til undanfarin ár, meðan 52% siga, at støðan er hampilig. Um 6% siga at støðan er ring.




*Mynd 8. Hvussu er støðan hjá toskinum í ár í mun til undanfarin ár?*

Í viðmerkingunum um støðuna vóru eisini bert jaligar viðmerkingar, um hvussu støðan er, nakrar teirra eru niðanfyri.

> Útróðrarmaður: *Byrjaði at fiska í 1996 og havi ongantíð sæð so nógvan smáan fisk sum í ár.*
>
> Trolmaður: *Støðan sera góð í mun til undanfarin ár.*
>
> Útróðrarmaður: *Betur nú enn tað hevur verið undanfarin ár.*
>
> Línumaður: *Støðan hjá toskinum er betri í ár í mun til undanfarin ár.*

## 4.6. Samanumtikið: Støðan hjá toskinum góð

Út frá kanningini kann samanumtikið sigast, at støðan hjá toskinum er góð. Nógv er til av toski. Toskurin er smáfallandi á at kalla øllum leiðum, tó góður fiskur er uppií. Fiskimenn- og kvinnur siga frá miðalfeitum ella feitum toski, tó ábendingar eru um, at ein ávísur munur er á ymiskum leiðum. Tilgongdin hevur verið góð seinastu árini. Staðfest verður eisini í kanningini, at støðan hjá toskinum er góð ella hampiliga góð í mun til undanfarin ár.

## 5. Støðan hjá hýsustovninum

Í fleiri ár hevur støðan hjá hýsustovninum verið vánalig. Lítið hevur verið at fingið av hýsu, og vanliga uppíblandið av hýsu í toskafiskiskapin hevur ikki verið í fleiri ár.

### 5.1. Støðan hjá hýsuni ring

Í kanningini verður eisini staðfest, at støðan hjá hýsuni er ring. Fleiri enn 60% siga at støðan er ring, 30% siga støðuna við hýsuni verða hampiliga, meðan bert heilt fá (2%) vísa á, at støðan er góð.




*Mynd 9. Hvussu er støðan hjá hýsuni – er nógv til?*

Hóast støðan viðv. hýsuni hevur verið ring í fleiri ár, og framvegis er ring, so verður tó í viðmerkingunum í samrøðunum víst á, at tað eru ávís positiv tekin um, at tað gongur frægari við hýsuni.

Útróðrarmaður: *Mest bara stór hýsa, men tendensurin er, at meiri smáhýsa er, enn tað hevur verið.*

Útróðrarmaður: *Ávís positiv tekn, smá hýsa er á veg, tí meiri hýsa er at fáa. Nú (fyrst í juni) er ring fiskitíð, og vit fáa hýsu.*

Útróðrarmaður: *Støðan hevur ikki verið góð seinastu 2 árini, men sær frægari út nú.*

Útróðrarmaður: *Sær betur út nú í ár enn undanfarin ár.*

Hóast fleiri eru jalig og vísa á, at tað sær betri út við hýsuni, so eru tað eisini fleiri, sum eru meiri ivasom. Ein útróðrarmaður sigur um hýsuna, at *minni er til enn tað hevur verið*. Ein annar útróðrarmaður í Suðuroynni sigur: *Man sær ikki hýsu kring Suðuroynna, næstan onga hýsu fingið.*

## 5.2. Fáa mest stóra hýsu

Vanliga verður sagt, at tað ikki er gott, um man bara fær stóran fisk, tí er ongin smáur fiskur, so boðar hetta ikki frá góðum komandi árini. Mynstrið í samrøðunum við fiskimenn og –kvinnur er rættiliga greitt, hýsan er stór (71%) ella miðalstór (27%), meðan fá siga, at hýsan er lítil (2%).




*Mynd 10. Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?*

Ikki vóru nógvar viðmerkingar um støddina á hýsuni. Í nøkrum samrøðum varð tó víst á, at *hýsan var góð og stór*, *at støddin var góð*, *at tað var mest gott slag*. Í øðrum samrøðum varð víst á, at saknur var í smáu hýsuni, ein útróðrarmaður segði: *Ov nógv av stórari hýsu, sakni tað smáa.* Ein annar staðfesti: *einki smátt uppií.* Onnur vístu hinvegin á, at glottar vóru: *hýsan er góð og stór, men meiri blandað nú*. Ein annar segði, *mest gott slag, men sær smátt uppi í, næstseinasta vetur var bara stór hýsa*.

## 5.3. Hýsan er feit

Eins og við toskinum, verður í samband við hýsuna víst á, at fiskurin er væl fyri, og at hýsan er feit. Í kanningini søgdu 66% at hýsan var feit, 30% søgdu at hýsan var miðalfeit, meðan bert 4% søgdu at hýsan ikki var feit.




*Mynd 11. Er fiskurin feitur?*

Í samrøðunum varð eisini sum heild víst á, at hýsan er væl fyri og hevur góða livur.

## 5.4. Tilgongdin hevur verið ring

At hýsustovnurin er illa fyri sæst eisini í metingunum av, at tilgongdin seinastu árini hevur verið ring. Í kanningini søgdu fleiri enn 62%, at tilgongdin seinastu árini hevur verið ring. 30% søgdu at tilgongdin hevur verið hampilig, meðan 6% søgdu at tilgongdin hevur verið góð.




*Mynd 12. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?*

Hóast mynstrið í svarunum er rættiliga greitt: tilgongdin hevur verið ring, so varð tó í fleiri samrøðum víst á, at nakrir glottar eru. Nakrar av hesum viðmerkingum eru niðanfyri.

Útróðrarmaður: *Eingin smáhýsa hevur verið uppií, men nú er eitt sindur.*

Línumaður: *Tilgongdin hevur verið ringt, men nú er nakað av smáari hýsu at fáa, og meiri enn fyrr.*

Útróðrarmaður: *Omanfyri miðal av smáum, so støðan er í betring.*

Í øðrum samrøðum varð tó víst á, at tilgongdin var lítil, ein útróðrarmaður segði: *Heldur lítil tilgongd av hýsu.* Ein annar, at *minni er til av hýsu enn tað plagar at vera.* Og víst varð eisini á, at *ikki nógv smátt uppí, ongin broyting seinastu árini.*

## 5.5. Støðan hjá hýsuni frægari

Tá spurt varð um hvussu støðan hjá hýsuni er í ár í mun til undanfarin ár, so eru deildar meiningar millum føroyskar fiskimenn og –kvinnur. Í kanningini vísa 11% á, at støðan er góð, 45% siga at støðan er hampilig, meðan 41% siga at støðan hjá hýsuni er ring.




*Mynd 13. Hvussu er støðan hjá hýsuni í ár í mun til undanfarin ár?*

Tá hugt verður at viðmerkingunum í samrøðunum, so bendir tó á, at støðan hjá hýsuni er frægari enn hon hevur verið seinastu árini. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

Útróðrarmaður: *Betur tilgongd, tí meir smá hýsa enn undanfarin ár.*

Útróðrarmaður: *Tað hevur eingin hýsa verið, men nú er í betring.*

Útróðrarmaður: *Onkur smáhýsa er at fáa - og størri tal av hýsu.*

Útróðrarmaður: *Samanborið við seinastu 4 árini, so er støðan betur.*

Útróðrarmaður: *Støðan er góð í mun til undanfarin ár, tí smá hýsa er uppi í nú.*

Onnur vóru meiri ivasom. Ein línumaður vísti á, at *støðan er tann sama, sum hon hevur verið*. Ein útróðrarmaður segði: *í fleiri ár hevur einki verið til av hýsu*. Ein annar: *Sama at fáa í ár sum í fjør, men einki smátt.* Ein annar útróðrarmaður segði: *Minni til í ár enn undanfarin ár.*

## 5.6. Samanumtikið: Støðan hjá hýsuni ring

Samanumtikið kann sigast, at støðan hjá hýsuni framvegis er ring. Lítið er til av hýsu. Hýsan er tó stór og feit. Tilgongdin hevur verið ring og er framvegis ring, tó víst verður á glottar. Í samrøðunum verður eisini víst á, at hóast støðan hjá hýsuni framvegis er ring, so er støðan betri í ár enn undanfarin ár, serliga tí at meiri av smáari hýsu er at fáa.

## 6. Støðan hjá upsastovninum

Tað eru lutfalsliga fá skip í føroyska flotanum, sum fiska upsa – í stóran mun trolarar og so einstakir útróðrarbátar. Hetta sæst eisini aftur í talinum av samrøðum (14 samrøður), har víst varð á, at upsi var høvuðsfiskaslagið.

### 6.1. Støðan hjá upsanum hampiliga góð

Seinastu árini hava verið metár hvat viðvíkur upsa. Nógv er fiskað av upsa, og støddarbýtið hevur verið gott, tó at nakað minni er til at stórum upsa enn fyrr. Fiskimenn og –kvinnur, sum hava luttikið í kanningini, eru sum so eisini samd um, at støðan hjá upsanum er góð (14%) ella hampilig (64%), meðan ein partur vísur á, at støðan er ring (14%).




*Mynd 14. Hvussu er støðan hjá upsanum – er nógv til?*

Í viðmerkingunum í samrøðunum vóru ymiskar áskoðanir um hvussu støðan var. Ein trolmaður vísti á at *støðan var heldur verri enn í fjør.* Ein annar trolmaður segði: *Seinasta heyst var ikki nógvur upsi, lótu tá ikki væl at, í vár var nógvur upsi, men minni enn vanligt*. Aðrir vísa á, at støðan er góð, tí *nógvur smáur upsi er uppí.*

### 6.2. Góð blanding av støddini av upsa

Kanningin gevur eina mynd av, at støddarbýtið av upsanum er gott. Tey flestu, sum luttóku í kanningini, vístu á, at upsin var miðalstødd (50%), meðan 21% siga fiskin verða stóran, og 14% at fiskurin er smáfallandi. 14% svaraðu annað, og varð sum heild víst á, at man fær allar støddir av upsa, at blandingin av støddini var góð.




*Mynd 15. Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?*

Í samrøðunum varð sum nevnt víst á, at blandingin av støddini av upsa var góð. Nakrar av viðmerkingunum í samrøðunum eru niðanfyri.

Trolmaður: *Allar støddir, alt eftir hvar man fiskar – gott tekn!*

Trolmaður: *Gott slag, men eisini væl av tilgongd av smáfiski.*

Trolmaður: *Støddin er alt eftir hvar tú fiskar.*

## 6.3. Upsin er feitur

Svarini tá umræður spurninginum um upsin er feitur, eru rættiliga eintýðug: Upsin er feitur ella miðalfeitur. Út við tveir triðingar, 64%, siga at upsin er feitur, meðan 36% siga at upsin er miðalfeitur. Ongin sigur at upsin ikki er feitur.




*Mynd 16. Er fiskurin feitur?*

Í fleiri viðmerkingunum verður eisini staðfest, at *fiskurin er feitur, sum hann plagar,* og at hann *hevur rímiliga livur*.

## 6.4. Tilgongdin seinastu árini

Eru fiskimenn og –kvinnur á einum máli um at upsin er feitur, so eru deildar hugsanir um hvussu tilgongdin hevur verið seinastu árini.




*Mynd 17. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?*

Í kanningini hava 14% sagt at tilgongdin hevur verið góð, 50% siga at tilgongdin hevur verið hampilig, meðan 21% siga at tilgongdin hevur verið vánalig. 14% siga annað, vísandi til, at tey ivast í hvussu tilgongdin hevur verið.

Samrøðurnar vísa eisini greitt, at tað eru ymiskar áskoðanir um tilgongdina hjá upsanum. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

Útróðrarmaður: *Kunnu draga so nógv sum vit vilja av smáum upsa, so nógv er til.*

Trolmaður: *Nógv smátt uppi í, í fjør var einki smátt uppií.*

Trolmaður: *Minkandi tilgongd, tí menn lata verri og verri at.*

Trolmaður: *Tilgongdin er minkandi.*

Trolmaður: *Nakað av smáum upsa er uppí.*

## 6.5. Støðan hjá upsanum

Støðan hjá upsanum hevur sum kunnugt verið góð í fleiri ár. Ábendingar eru um at fiskiskapurin eftir upsa er minkaður nakað, og fiskimenn og –kvinnur lata heldur ikki so væl at støðuni.




*Mynd 18. Hvussu er støðan hjá upsanum í ár í mun til undanfarin ár?*

Tey flestu, 69%, siga støðuna verða hampiliga – og í viðmerkingunum vísa nøkur á, at støðan er tann sama sum undanfarin ár. 31% siga hinvegin, at støðan hjá upsanum er ikki góð. Í viðmerkingunum verður víst á, at minni er til av upsa enn undanfarin ár.

### 6.6. Samanumtikið: Støðan hjá upsanum á leið tann sama

Samanumtikið kann sigast, at støðan hjá upsanum er á leið tann sama, sum hon hevur verið seinastu árini. Tað er framvegis hampiliga nógv til av upsa, støddin er blandað, og fiskurin er feitur. Tilgongdin verður mett at verða hampilig, hóast ymiskar meiningar eru um, hvussu tilgongdin hevur verið. Fleiri enn tveir triðingar meta at støðan hjá upsanum er hampilig, meðan góð 30% siga støðuna verða ringa.

# 7. Onnur fiskasløg

Í samrøðukanningini vórðu eisini svar givin í samband við onnur fiskasløg, hesi fiskasløgini verða viðgjørd í hesum partinum. Talan er um fiskasløgini: longa og brosma, flatfiskur (reyðsprøka og tunga) og havtaska, svartkalva, kongafisk og stinglaks.

## 7.1. Longa og brosma

Línuskipini eru tann parturin av flotanum, ið fiskar mest av longu og brosmu, men eisini trolarar í bólki 1, lemmatrolarar, og í bólki 2, partrolarar, fáa longu og brosmu sum hjáveiðu.

### 7.1.1. Longa

Seinasta árið (frá 1. mai 2010 til 30. apríl 2011) hevur verið fiskað nakað meiri av longu enn undanfarna ár. Serliga eru tað línuskipini (bólkur 3), sum hava fiskað meiri av longu, 2.688 tons seinasta árið í mun til 2.177 tons árið frammanundan. Samanlagt er veiðan hækkað úr 3.535 tonsum til 4.121 tons hetta tíðarskeiðið (Fiskiveiðieftirlitið, juni 2011).

Í samrøðunum (11 samrøður) verður víst á, at støðan hjá longuni er góð (63,6%) ella hampilig (36,4%), meðan ongin vísir á, at støðan við longuni er ring. Víst verður eisini á, at talan er um stóra (36,4%) ella miðalstóra (54,5%) longu, meðan 9,1% siga at longan er lítil. Ein greiður meiriluti sigur eisini at longan er feit (81,8%), meðan 9,1% siga, at longan er miðalfeit, og onnur 9,1% siga, at hon er rak.

Greið semja er um, at tilgongdin av longu hevur verið góð (45,5%) ella hampilig (54,5%) seinastu árini, og at støðan er hampiliga góð í mun til undanfarin ár. 27,3% søgdu, at støðan er góð, meðan 72,7% søgdu, at støðan er hampilig.

### 7.1.2. Brosma

Eins og við longuni, so er fiskað væl meiri av brosmu seinasta árið  (frá 1. mai 2010 til 30. apríl 2011) enn undanfarna árið – og eru tað eisini serliga línuskipini, sum fiska brosmu. Árið 1. mai 2010 til 30. apríl 2011 vórðu fiskaði 2.996 tons av brosmu, í mun til 2.386 tons árið fyri. Seinasta árið hava línuskipini fiskað 2.621 tons av brosmu, í mun til 2.001 tons árið fyri.

Í samrøðunum (10 samrøður) verður víst á, at støðan hjá brosmuni sum heild er góð (60,0%) ella hampilig (40,0%), og at brosman er stór (50%) ella miðalstór (50%). 60% søgdu eisini at brosman er feit, meðan 30% søgdu hana verða miðalfeita, og 10% søgdu hana verða rak. Semja er um at tilgongdin hevur verið góð (50%) ella hampiliga góð (50%), og at støðan er hampiliga góð í mun til undanfarin ár – 30% søgdu støðuna verða góða, meðan 70% søgdu støðuna verða hampiliga.

### 7.1.3. Ongi norsk línuskip

Í viðmerkingum varð víst á, at tað at norsk línuskip ikki royna eftir longu og brosmu hevur við sær, at nógv meiri er at fáa av longu og brosmu. Ein línumaður segði: *Í ár eru eingi norsk línuskip, so vit kunnu fara*

*longur út. Meiri spennandi hjá okkum og minni troyttir grunnar*. Ein annar línumaður segði: *Eitt sindur meiri at fáa – møguliga er tað tí at eingir norðmenn fiska við Føroyar í ár*. Ein línumaður segði: *Minni roynd – eingir norðmenn. Fiska á djúpum vatni og fær frið at fiska*. Og ein annar: *Eingir norðmenn – og tað er fínt*.

Tá línuskipini meiri miðvíst kunnu fara á longu og brosmu veiðu úti á, ger hetta eisini, at ikki eins nógv skip royna innari á landgrunninum.

## 7.2. Reyðsprøka og tunga (flatfiskur) og havtaska

Tað eru mest trolbátarnir, sum fiska reyðsprøku, tungu og havtasku, tó garnabátarnir eisini fiska havtasku í beinleiðis veiðu. Tilsamans eru 5 av samrøðunum viðv. fiskasløgunum reyðsprøka og tunga, og 4 samrøður um havtasku.

Tey, ið fiska reyðsprøku og tungu, lata nøkulunda væl at. Nógv reyðsprøka er til og víst verður á, at árini 2010 og 2011 eru betri enn árini frammanundan. Tá umræður tungu, so hevur mongdin verið á leið tann sama, kanska heldur minni enn undanfarin ár. Í samrøðukanningini verður víst á, at flatfiskurin sum heild hevur góða stødd, og fiskurin er feitur. Mett verður at støðan er hampilig, tó er semja ikki um hvussu tilgongdin hevur verið. Ein trolmaður vísur á, at tilgongdin hevur verið góð, ein at tilgongdin hevur verið ring, meðan tríggir meta tilgongdina verða hampiliga.

Tá umræður havtaskuna vísa 3 av 4 fiskimonnum og –kvinnum á, at støðan hjá havtaskuni er góð. Víst varð eisini á at havtaskan hevur góða (2 av 4) og miðalgóða stødd (2 av 4), og at fiskurin er feitur (3 av 4 søgdu hetta). Mett verður eisini at tilgongdin hevur verið góð (2 av 4) ella hampiliga góð (2 av 4) – og at støðan er hampiliga góð í mun til undanfarin ár.

## 7.3. Svartkalvi og kongafiskur

Í samband við svartkalva og kongafisk vórðu tvær samrøðukanningini gjørdar við fiskimenn, sum eru umborð á lemmatrolarum, bólkur 1, sum fiska svartkalva og kongafisk.

Víst var í samrøðunum á, at fiskiskapurin eftir svartkalva er betur í ár enn í fjør. Ein orsøk til betri fiskiskap eftir svartkalva verður mett verða, at garnaskipini ikki hava roynt eins nógv og onnur ár. Sagt verður annars, at støðan hjá svartkalvanum er hampilig, fiskurin er miðalstórur og feitur. Í mun til onnur ár, har svartkalvin hevur etið nógvan svartkjaft, so hevur manglandi svartkjafturin ávirkað svartkalvafiskiskapin nakað, men *í fjør var eitt sindur av makreli í svartkalvanum*, tað sama er galdandi í ár. Ein trolmaður segði: *Svartkjafturin manglar í stóran mun í ár. Svartkjaftur er vanliga i svartkalvanum, tá kruvt verður. Men nú er ongin. Hava tó sæð nakað av smáum makreli í svartkalvanum nú*. Tá umræður tilgongdina, verður mett at tilgongdin hevur verið hampilig seinastu árini.

Undir Føroyum eru tvey sløg av kongafiski, eitt eystanfyri og eitt vestanfyri. Í samrøðunum verður víst á, *at kongafiskurin eystanfyri er sera illa fyri, har er næstan ongin kongafiskur, meðan tann vestanfyri er betri fyri*. Víst verður á, at stovnurin tykist sera viðbrekin og verður ávirkaður av liviumstøðum, t.e. av føði og hita. Mett verður eisini at *tilgongdin hevur verið ring seinastu árini, og at støðan er hin sama, sum hon hevur verið seinastu árini.* Tað hevur ikki verið roynt nógv eftir kongafiski seinasta árið.

## 8. Æti

Í samrøðukanningini varð eisini spurt um hvussu støðan er við æti – um nógv lív er í sjónum. Ymiskt er hvussu svarini vóru, 23% søgdu at støðan var góð, 41% at støðan var hampilig, meðan 29% søgdu at støðan var ring. 7% søgdu annað. Summi vístu til, at tað var trupult at siga, í øðrum førum, at tað var ymiskt við æti á ymiskum leiðum.




*Mynd 19. Hvussu er støðan við æti – er nógv lív í sjónum ella?*

Sama mynstur er eisini galdandi, tá hugt verður at, hvussu svarað var í smb. við spurninginum um hvussu støðan við æti er í ár í mun til undanfarin ár. Nøkur meta støðuna góða (12%), 52% meta at støðan er hampilig, meðan 24% meta støðuna verða ringa.




*Mynd 20. Hvussu er støðan við æti í ár í mun til undanfarin ár?*

Tá hugt verður at viðmerkingunum í samband við spurningin um æti, so eru viðmerkingarnar rættiliga ymiskir. Ein reyður tráður tykist tó verða, har tey sum royna nærri landi, eitt nú útróðrarmenn, vísa á, *at støðan ikki er so góð, lítið er til av æti, síggja onga nebbasild og toskurin er fullur av krabbadjórum og krossfiski*. Meðan tey, sum eru umborð á skipum, sum royna longri útiá, vísa á, at støðan er frægari, meiri er til av æti, og *í maganum er nebbasild og lítil makrelur og fiskurin er feitur*.

Í viðmerkingunum verður eisini í nógvum førum víst til hitan, ella rættari sagt manglandi hitan, har víst verður á, at kalda høgættin, sum hevur ligið í mai mánað, hevur stóra ávirkan á æti. Ein útróðrarmaður vísur á, at *hitin hevur nógv at siga, um nógv høgætt er, so er ikki nógv æti. Beinanvegin tað er lágætt, so er nógv lív í sjónum, og svartfuglur er at síggja.* Ein trolmaður vísti á, at *tað er bara høgætt, og tí er einki æti í sjónum*

Samanumtikið bendir á, at støðan viðvíkjandi ætinum er rættiliga ymisk, við lítið av æti innari á landgrunninum, meðan støðan tykist verða betri úti á.

# 9. Fiskidagar

Í samrøðukanningini varð eisini spurt um viðurskifti viðvíkjandi fiskidøgunum, um einstaki báturin/skipi hevur nokk av fiskidøgum, um bólkurin hevur nokk av fiskidøgum, og um hvussu talið av fiskidøgum hjá flotanum er sum heild.




*Mynd 21. Hevur tykkara bátur/skip nokk av fiskidøgum?*

Ein meiriluti av teimum, sum luttóku í kanningini vístu á, at teirra bátur ella skip hevði nokk ella nøkulunda nokk av fiskidøgum – 34% søgdu at tey høvdu nokk av fiskidøgum, 36% at fiskidagatalið var nøkulunda. Hinvegin vóru tað 29% sum vístu á, at báturin/skipið ikki hevði nokk av fiskidøgum.

Á leið somu viðurskifti vóru galdandi, tá spurt varð um skipabólkurin hevði nokk av fiskidøgum, tó vóru tað nakað fleiri, ið vístu á, at teirra bólkur ikki hevði nokk av fiskidøgum.




*Mynd 22. Hevur tykkara bólkur nokk av fiskidøgum?*

35% søgdu, at teirra bólkur hevur nokk av fiskidøgum, 24% at fiskidagatalið hjá bólkinum er nøkulunda, meðan 36% søgdu, at bólkurin hevði ov fáar dagar. Um hugt verður at hvørjir bólkar serliga vísa á, at fiskidagar mangla í, so er tað serlig lemmatrolararnir í bólki 1, sum yvir ein kamb vísa á, at teir hava ov fáar fiskidagar[3]. Eisini allir trolbátarnir í bólki 4T vísa á, at teir hava ov fáar dagar, meðan ein munandi partur av partrolarunum vísa á, at dagatalið er ov lágt hjá bólkinum.




*Mynd 23. Hvussu heldur tú sum heild at talið av fiskidøgum hjá flotanum er?*

[3] Lemmatrolararnir (bólkur 1) komu uppí Fiskidagaskipanina í fjør og fingu tá samanlagt 2.600 dagar, harav 900 eru á innaru leið. Áðrenn lemmatrolararnir komu uppí fiskidagaskipanina var ikki óvanligt, at teir mynstraðu 280-300 dagar um árið, so niðurskurðurin í fiskidøgum er ein munandi avmarking í døgunum hjá bólki 1.

Meiningarnar um hvussu fiskidagatalið hjá flotanum sum heild er, eru rættiliga ymiskar. Fá søgdu, at fiskidagatalið var gott, 45% at fiskidagatalið var nøkulunda, meðan 18% søgdu at dagatalið var ov lágt, og 2% søgdu, at talið av fiskidøgum var ov høgt.

Nærum ein triðingur, 29%, søgdu annað, og vístu til ymisk viðurskifti í samband við fiskidagaskipanina.

Ein annar útróðrarmaður vísti á: *Meir fiskadagarnir minka, so kompensera bátarnir bara við línu, og hava sera nógva línu við. So veiðiorkan minkar ikki tað stóra, hóast fiskidagarnir minka.*

Ein trolmaður vísti á, at *dagar í bólki 1 og bólki 2 skulu kunnu handlast millum bólkarnir. Hettar er sama fiskarí, og skuldi ikki verði nakar munur á. Tað er ein andsøgn, at skip í bólki 1 ikki kunnu nýta dagar frá skipum í bólki 2, ikki ein gong er møguligt at gera hettar síðsta 3 mánarskeiðið, men tað ber til hjá einum skipi í bólki 2 at keypa dagar frá skipum í bólki 3 (línuskipum), sum verða brúktir at trola við. Og øvugt kunnu línuskip keypa troldagar fyri so at fiska tosk og hýsu við inni í trolfriðaðum økjum. Hettar er tað sum ber til og verður gjørt í verandi skipan.*

Ein annar útróðrarmaður segði: *vóni ikki at teir nerta dagarnar meiri, teir taka alla tíðina og skava burturav, so man ikki veit hvat man hevur. Útróðrarflotin er so minimalur, sum hann er nú. Fyrr vóru 30 bátar í bólki 4A bara í Klaksvík, nú eru 5, og fyri allar Føroyar eru í mesta lagi 10 bátar eftir í hesari støddini.*

Ein annar útróðrarmaður vísti á, *at størsta álopið kemur frá politikkarunum (landinum), og tá tímir eingin. Á hvørjum árið er tað so, at man veit ikki hvussu verður við døgunum – tað er strævið.*

Ein útróðrarmaður segði: *Fiskidagaskipanin góð skipan at byrja við, men bleiv oyðiløgd av umsetiligheit.*

Trupult er at gera nakra heildarniðurstøðu hvat viðvíkur spurninginum um fiskidagatal, men fyri at vísa á ymisku hugsanirnar í samband við talið av fiskidøgum, er valt at hava hendan partin við í frágreiðingini.

## 10. Friðingar út til 1,5 ella 3 fjórðingar

Í samrøðukanningini brúktu nógvir útróðrarmenn og –kvinnur, høvið í viðmerkingunum, at enda at vísa til ætlaðu friðingina av vinnuligari línuveiðu út á 1,5 ella 3 fjórðingar, sum varð lagt fyri Løgtingið herfyri.

Tað er breið semja millum útróðrarmenn og –kvinnur, at ein friðing av hesum slagi er ikki rætta loysnin, tí á nógvum leiðum innanfyri bæði 3 og 1,5 fjórðing eru góð fiskimið, har tað bara fæst stórur fiskur. Harumframt verður eisini víst á tað sannroynd, at ungfiskurin ikki altíð er nær landið, men í ár hevur verið at fáa á øllum leiðum.

Útróðrarmaður: *At friða 1,5 fjórðing úr landi hevur onga ávirkan á smáfiskin. Ungfiskurin er á grynnum. Stórur fiskur er eisini inni við land eystanfyri, har vit royna.*

Útróðrarmaður: *At friða 1,5 til 3 fjórðingar úr landi, er púra hol í høvdið. Smáur fiskur er allastaðni.*

Útróðrarmaður: *Friðing út á 3 fjórðingar eri eg ímóti. At friða inn í klettin er ikki rætt, tí har er eisini stórur fiskur. Betur at friða onkur økir/kassar, so ungfiskurin fær frið.*

Útróðrarmaður: *Friðingar inni við land, tað góðtaka vit ikki. Sandbotnar/bleytur botnur – har er bara gott slag, stórur fiskur, so tað er ikki ílagið at friða tað. Ungfiskafriðing er ílagið, men sum tað bleiv gjørt í vár, at man eisini friðaði bleytan botn, tað er púra burtur við. So konsekvent at friða út til 3 fjórðingar, tað er ikki ílagið, tað skal gerast við skili.*

Útróðrarmaður: *Eg eri ímóti at friða út á 3 fjórðingar, men eri fyri at friða øki/kassar í 3 vikur ella 1 mánað. Smáur fiskur allastaðni, og stórur fiskur eisini allastaðni, so tí ger tað onga nyttu at friða alt út á 3 fjórðingar.*

Útróðrarmaður: *Um man skal friða úr á 3 fjórðingar, so skal friðast fyri allari veiðu. Betur um tað er 1 fjórðing úr landi. Annars ikki altíð at ungfiskurin er nær landið.*

Útróðrarmaður: *At friða út á 1,5 ella 3 fjórðingar gevur lítla meining. Ungfiskur er allastaðni. Fiskurin, sum er innarliga er rak, hevur onga livur, fær ov lítið av føði, so tað gevur lítla meining at friða, tá fiskurin onki hevur at eta.*